Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Beinta Løwe Jacobsen, løgtingsmaður

Svarari: Magnus Rasmussen, landsstýrismaður í umhvørvis- og vinnumálum

Evni: Møguleikin hjá útlendingum at læra føroyskt

Spurningar:

1. Hvat verður gjørt fyri at tryggja sær, at útlendingar, ið flyta til Føroya, læra føroyskt?
2. Hvørji krøv eru til útlendingar um, at tey skulu læra føroyskt, um tey skulu vera her í longri tíð?
3. Hvør hevur ábyrgdina av at tryggja, at útlendingar, ið búsetast í Føroyum, verða integreraðir?
4. Hvat verður gjørt fyri at integrera útlendingar, ið flyta til Føroya?

Viðmerkingar:
Nógvir útlendingar eru komnir til Føroya seinastu árini. Summi fyri at arbeiða í styttri tíðarskeið, onnur fyri at búseta seg her. Nógv av teimum vilja læra føroyskt, men sum skilst, er tað ikki altíð so lætt hjá teimum, kanska tí tilboðini ikki eru har, ella tí at hetta ikki samsvarar við arbeiðstíðina hjá teimun.
Summar fyritøkur hava av eintingum skipað fyri undirvísing í føroyskum fyri útlendskum starvsfólkum. Hetta er eitt sera gott tiltak.
Tað er umráðandi, at útlendingar læra føroyskt, tí harvið er tað lættari hjá teimum at gerast partur av føroyska samfelagnum Eisini er tað umráðandi, at tey læra føroyskt, so tey sjálvi vita, hvørji rættindi og skyldur tey hava í føroyska samfelagnum.

Á Løgtingi, 20. juni 2022

Beinta Løwe Jacobsen